# Miðvikan

Siglingin undir krígnum:

# Hondin sum í dreymi broytti kósina

**Tað eru nógvar ótrúligar hendingar og lagnur, sum hava verið føroyskum sjómonnum fyri, eisini undir seinna heimsbardaga. Vit hava greitt frá hendingini við Tór II. Her skulu nakrar takast fram afturat**

Í 2005 vóru liðin 60 ár síðani, at Hitler varð bastur og hansara heimsbardagi var av. Hetta var umrøtt í miðlum um allan heimin. Í Føroyum var hetta bert gjørt av FF-blaðnum.

Hetta var eisini gjørt í samband við luttøku í árliga minningarhaldinum í donsku kirkjuni í Newcastle fyri teir donsku og føroysku sjómenn, sum fórust undir krígnum.

Har hitti eg ein hóp av áhugaverdum fólki, sum kundu greiða frá serligum hendingum. Tað vóru eisini føroyingar við, sum somuleiðis kundu greiða frá.

Minningarhaldinum tann 1. november sama ár varð eisini gjørt nakað serligt burtur úr. Fiskimannafelagið bjóðaði krígssiglarum við makum til eina samkomu á Sjómansheiminum. Her var undirtøkan góð, eini 80 fólk vóru við.

Fleiri høvdu orðið og greiddu frá teirra upplivilsum á sjónum undir krígnum.



*Hetta var støðan hjá mongum føroyskum fiskimanni undir báðum heimsbardøgum. Ingálvur av Reyni teknaði*

### Álopnir av týskum flogfari.

Tann elsti á samkomuni var helst tann tá 92 ára gamli Søren Jacob Lamhauge úr Rituvík. Hann sigldi krígsárini við »William Martin«. Niclas Højgaard í Rituvík var skipari. Sørin Jakku greiddi frá um kavbátar og minur, sum var ein partur av dagligdegnum. Bert ein dag skutu og søktu teir 8 minur. Hetta var eisini eitt hart lív og ikki minst tað stóra sálarliga trýstið. Teir fóru ongantíð úr klæðunum, tá ið teir tørnaði inn. Eingin visti, hvat kundi henda!

Tá teir søgdu konuni og børnunum farvæl, var tað altíð við óvissuni um, hvørt tey fóru at síggjast aftur.

Serliga ein túrur hjá »William Martin« gjørdist minniligur. Teir vóru uppi á Nesgrunninum, norðanfyri Langanes, tá teir vórðu álopnir av einum týskum flogfari, sum áhaldandi skeyt eftir teimum. Skiparin royndi at skjóta aftur í móti, men tað tyktist ikki at muna nógv.

Tað var "jobbið" hjá Søren Jakku at passa rakettapparatið. Hetta varð nýtt til at skjóta rakettir við einum veiri upp í loft. Fyri endanum á veirinum var ein fallskíggi, sum opnaði seg, tá komið var nóg langt upp. Fallskíggin gjørdi so tað, at veirurin kundi vera í luftini eina góða løtu. Hetta skuldi so ræða flogførini, so tey ikki komu ov nær fyri at teir ikki skuldi fáa veirin um propellina. Sørin Jakku skjýtur, og tað var nær við, at flúgvarin fekk veirin um annan veingin, men hann kantraði sær á og slapp undan.

Tá hendi tað óhepna, at ein maður niðri í lugarinum varð raktur av eini kúlu, sum fyrst rakti skeilettið og síðani fór niður ígjøgnum, har hon brast og eitt petti av henni rakti ein oyndfirðing meint í ryggin.

Men tá var tað so heppið, at tvey bretsk krígsskip nærkaðust. Hetta gjørdi so tað, at týska flogfarið slapp sær til rýmingar, meðan teir samstundis fingu í boði sjúkraviðgerð til tann skadda. Hann fór umborð á annað krígsskipið og varð lagdur undir skurð innan ein tíma aftaná, at hann var skotin. Hetta má sigast at hava ligið væl fyri úti á víðum havi.

Teir fóru so við »William Martin« inn á Seyðisfjørðin at fáa bráðfeingis umvælingar fyri tann skaða, sum teir høvdu fingið av týsku skotríðunum. M.a. var bjargingarbáturin oyðilagdur, og tað var hol ymsastaðni í skrokkinum á skipinum, og hesi royndu teir at tetta.

Tá teir sigldu niður til Aberdeen, vísti tað seg, at tað ikki var eydnast at tetta øll holini, so skipið lak framvegis. Teir máttu skunda sær inn til Aberdeen uttan at hava fingið neyðugu loyvini. Hetta skapti í fyrsta umfari trupulleikar við myndugleikarnar, men teir blíðkaðust, tá teir frætti um støðuna.

---

Ískoyti til søguna um Tór II:

# Pápin doyði fyri sonin

Hetta er frásøgn hjá Poul í Skorini, ættaður av Eiði:

Eg var til skips á hvørjum ári frá tí, eg var 14 ár. Fyrst í juli mánað í 1942 fóru vit, 7 mans, til Íslands at keypa fisk við Vestmannasluppini »Flower of the Forest«. Tá vit høvdu fingið last, varð farið avstað til Aberdeen at selja.

Ferðin gekk væl, til vit 20. juli vóru staddir umleið 100 fjórðingar vestan fyri Suðuroynna. Hendan dagin kl. 6 á kvøldið var ein spreinging har afturi í skipinum av eini minu. Bresturin var so harður, at skipið fór so illa at leka, at tað var ógjørligt at halda tí lens, og motorurin steðgaði eisini.

Vit sjey, sum við vóru, sóu, at ikki var hugsandi at gera annað, enn at seta bátin út og tað skjótt. Vit høvdu bert ein pinkulítlan bát, bert 8-9 alin langur, ein sokallaður ritubátur. Vit komu allir sjey í bátin og róðu beinanvegin eitt sindur burtur frá skipinum, sum sakk eftir 20 minuttum.

Báturin var hampiliga væl útgjørdur og hevði eisini segl. Nú vildi so væl til, at vindurin lá beint á Føroyar. Tí varð roynt at sigla, hóast veðrið var sjaskut, og vit ofta fingu so nógvan sjógv inn í bátin, so oysast mátti av øllum alvi. Tá vit høvdu siglt í 12 tímar, stilti av, og so varð farið at rógva. Hetta hendi sum sagt kl. 6 á kvøldi, so náttin var sera óhugnalig.

Tá vit høvdu siglt og róð í 30 tímar komu vit til lands í Sumba, móðir og útlúgvaðir. Vit blivu væl móttiknir av sumbingum, sum hjálptu okkum niðan frá, tí hjá summum knípti at ganga."

Poul var heimkomin so illa fyri, at hann einki gjørdi eina tíð.

Seinni sama summar, nevniliga 7. september, hendir tað, at pápi Poul, Rasmus, er ein av teimum sum sjólátst við »Tór 2«. Og soleiðis vildi lagnan tað. Tað var Poul, sum átti kjansin við Tór II, men pápin var farin fyri hann hendan túrin og kom ikki aftur.

Malmberg Simonsen greiddu frá, at tað síðsta hann minnist Rasmus var, at hann lá í koyggjuni og las í Bíbliuni.

Poul andaðist í 2004 84 ára gamal.



*Poul í Skorini. Hann lata pápa sín fara fyri seg við Tór II og bjargaði lívinum. Sjálvur kundi hann fingið somu lagnu við »Flower of the Forest«*